

SANSIR TEL 355 355

# Ein ríkur felagsskapur

Ríkisfelagsskapurin er ríkur í møguleikum. Hann tryggjar persónliga frælsið og varðveitir fjølbroyttu møguleikarnar hjá komandi ættarliðum.

Nógv er broytt, síðani heimastýrislógin kom í gildi fyri 54 árum síðani, og tíðin er komin at fremja neyðugar dagføringar í samstarvinum við Danmark.

Okkara uppskot til nýskipan staðfestir, at føroyingar eru ein sjálvstýrandi tjóð. Heimastýrislógin skal dagførast, so øll málsøki kunnu yvirtakast. Undantikin eru tey mál, sum eru garðurin um ríkisfelagsskapin.

Vit skulu framvegis hava somu ríkisborgararættindi, felags grundlóg og kongshús. Vit skulu samstarva við Danmark í gjaldoyraviðurskiftum. Verju- og uttanríkispolitikkurin skal formliga umsitast av ríkismyndugleikunum. Og vit skulu í høvuðsheitum varðveita rættarskipanina.

Við Sambandsflokkinum tryggja vit tey felags rættindi, sum ríkisfelagsskapurin millum Føroyar, Danmark og Grønland hevur við sær.

**Sambandsflokkurin**

**- gott samstarv**

5 707265 100050 >